Nýtt tónleikafelag:

# Ein pall til tónleikin

**Alt gott um fótbóltslandsliðið, men ímynda tær, at tað ongan vøll hevði at spæla á. Tað er støðan hjá tónleikinum í Føroyum. Vit hava eina rúgvu av góðum tónleikarum og bólkum, men vit hava ongan pall at spæla á, sigur Rógvi á Rógvu, ið er ein av stigtakarnum til nýggja tónleikafelagið í Havn. Stovnandi aðalfundurin verður í Skansastovu leygardagin kl. 15**

*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*



*Rógvi á Rógvu vil nú hava eitt spælistað, sum bara skal brúkast til tónleik*

Vit hava leingi roynt at bøtt um umstøðurnar hjá tónleikarum í Føroyum, men eg má tíverri ásanna, at higartil hava vit bara møtt óvilja frá Tórshavnar býráð. Har tykist at vera øgiliga lítil virðing fyri tónleiki, sammett við londini rundanum okkum, har tónleikur verður mettur sum ein týdningarmikil partur av tjóðarmentanini. Her í Føroyum eru vit uppi ímóti einum hugburði, sum sigur, at ein tónleikari skal vera lítillátin og ógvuliga takksamur, hvørja ferð hann sleppur at spæla alment.

Sum er dúva vit uppá beinasom feløg, sum lata okkum brúka sítt høli, tá tað ber til. Tey í Grímu hava til dømis verið serliga fyrikomandi, tá vit hava spurt um gamla Meiaríið

### Brotið lyfti

Politikarnir duga ikki at síggja trupulleikan, tá vit nú hava tvey fín mentanarhús umframt eina røð av klubbum, ið eisini verða nýttir sum spælistøð. Gamaní, Norðurlandahúsið er stórfingið og Mentanarhúsið í Fuglafirði er frálíkt. Men bæði skulu hýsa øllum møguligum ymsum mentanartiltøkum, har ein rockkonsert bert verður skorað inn ímillum, tá og um tað hóskar inn í skránna annars. Og tá fólk fara á vertshús ella café, er tað fyrst og fremst fyri at práta ella hugna sær við eini øl. Ikki fyri at sita og lurta eftir tónleiki.

Vit halda, at bæði tónleikarnir og býðurin sum heild hava uppiborið eitt stað, har tónleikurin kemur í fremstu røð og ikki bara hongur uppi í onkrum øðrum. Men tað heldur býráðið ikki. Ongar ítøkiligar ætlanir eru um at byggja nakað konserthús, og ongin peningur er settur av til nakað líknandi. Borgarstjórin hevði annars lovað okkum gamla reinsaríið sum spælistað burturav, men ongin annar í býráðnum tykist at vita nakað um ætlanina, so tí vónini hava vit slept.

### Tónleikamiðdepil

Vit eru púra greið yvir, at hetta snýr seg um pengar. Men ein møguligur stuðul til ætlanina er also ikki ein rein útreiðsla, tí hann fellir meir enn einaferð aftur til kommununa sum skattur frá teimum, sum koma at starvast í húsinum. Slík hús lokka eisini altíð ferðafólk til sín, umframt at konsertirnar uttan iva fara at stimbra søluna av føroyskum fløgum.

Vit ímynda okkum eitt konserthús, sum verður eitt slag av tónleikaligum miðdepli. Bæði tá tað snýr seg um at kunna um tónleikatiltøk yvirhøvur, men ikki minst fyri at skapa eitt mennandi og livandi tónleikaumhvørvi, har tónleikarar kunnu hittast og søkja sær íblástur og knýta sambond.

Hetta letur jú eisini upp fyri heilt nýggjum møguleikum at bjóða útlendskum bólkum og tónleikarum til Føroyar og soleiðis eisini fyri føroyingar at koma í samband við tónleikaumhvørvi aðrastaðni.

Men fyrst og fremst skal hetta vera eitt stað, har pláss er fyri øllum tónleikasløgum. Man kundi til dømis havt eitt kvøld fyri ungdómsbólkar, eitt fyri

*Framhald á síðu 3*






Jan Christiansen:

# Saknar ítøkiligt uppskot

**Sjálvandi eru vit áhugaði í, at mentanarlívið í høvuðsstaðnum verður so fjølbroytt, sum gjørligt. Og tankin um eitt konserthús er søtur musikkur í okkara oyrum. Men eg havi enn ikki sæð nakað ítøkiligt uppskot og veit tí í grundini ikki, hvat tað er, eg skal taka støðu til, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.**

*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Tað er ikki rætt, at tónleikurin í Havn er fullkomiliga sleptur uppá fjall. Vit hava jú bæði Norðurlandahúsið, Sjónleikarahúsið umframt eina rúgvu av smærri spælistøðum. At hesi ikki verða rikin sum spælistøð burturav kemst av, at tey onkusvegna skulu bera seg fíggjarliga. Vit hava eisini ætlanir um at gera gamla reinsaríið til eitt spælistað, umframt at ein partur av gamla posthúsinum eisini fyribils skal nýtast til eitthvørt líknandi.

Gomul hús og fyribils møguleikar. Hetta ljóðar mest sum lappaloysnir. Hevur býráðið ongar ítøkiligar ætlanir um, at lata tónleikin fáa sítt egna konserthús, har hann ikki skal kappast við onnur um at fáa innivist?

Nei, í løtuni hava vit ongar slíkar ætlanir. Og eg haldi heldur ikki, at tað skal vera býráðið, sum tekur eitt slíkt stig. Tað eiga tónleikarnir sjálvir at gera. Teir vita, hvør tørvurin er, og hvørjar møguleikar eitt slíkt hús skal hava. Um teir vísa ein vilja til at standa á odda fyri verkætlanini, vilja vit sjálvandi stuðla teimum, eins og vit stuðla øðrum mentanar- og frítíðarvirksemi í býnum, sigur Jan Christiansen.

### Hørð kapping

Tað kann hugsast, at umstøðurnar hjá tónleikinum kundi verið betri, men tað kundu tær verið á so nógvum øðrum økjum eisini. Tað verður togað í býráðið allastaðni frá, og onkustaðni mugu raðfestingarnar byrja.

Higartil eru tónleikarnir bara komnir við krøvum um, at vit skulu byggja teimum eitt hús. Teir eru komnir hvør í sínum lagi og ikki sum eitt savnað og virkið áhugafelag, sum veruliga er sinnað at vísa vegin við uppskotum og langtíðar fíggjarætlanum. Tað gera onnur feløg, og tá kappingin um pengarnar er hørð, verða tað tey mest ítøkiligu uppskotini, býráðið fyrst hyggur uppá.

Spurningurin er eisini, hvør eigur at hava ábyrgdina av rakstrinum av einum slíkum konserthúsi. Er tað kommunan, landið ella kanska musikkskúlaskipanin? Eg veit ikki og sum sagt, havi eg onki ítøkiligt uppskot sæð enn.

### Hvør er tørvurin?

Ein av stigtakarnum til nýggja tónleikafelagið sigur seg hava varhuga av, at ætlanin við gamla reinsarínum er slept. Hvussu ítøkilig er tann ætlanin í veruleikanum?

Mær vitandi er ætlanin ikki slept. Vit hava longu tekningar, ið leggja upp fyri, at húsið skal kunna brúkast sum mat- og dansistað, har tónleikurin sjálvandi er ein nátúrligur partur.

Men, also ikki eitt spælistað burturav?

Nei, ikki sum er. Vit hava ikki endaliga avgjørt enn, hvussu virksemi í húsinum skal skipast

Eg kundi eisini fyrst hugsað mær at vita, hvussu høgt ambitiónsstøði er. Snýr tað seg um, at nakrir tónleikarar skulu sleppa at sita og jamma saman onkur kvøld, er neyvan neyðugt við einum stórum konserthúsi. Hinvegin eiga vit at ansa eftir, at vit ikki seta okkum so høg mál, at tey ikki lata seg gera, sigur Jan Christiansen, sum sigur seg fegnast um, at eitt tónleikafelag er á veg, sum vónandi fer at koma við eini nágreiniligari meting av veruliga tørvinum.



*Jam Christiansen sigur, at í løtuni hevur Býráðið ongar ætlanir um at gera eitt konserthús til tónleikarar*

*Framhald frá síðu 2*

jazz, klassiskan tónleik, sang o.s.fr. Og verður tað pláss fyri tí, skulu aðrar listagreinar eisini sleppa framat, sigur Rógvi.

### Útlendskt blástempul

Næsta stig á skránni hjá nýggja tónleikafelagnum er at fáa fleiri venjingarhøli til vega.

Venjingarhølini á ovastu hædd á Margarinufabrikkini eru fín, og bólkarnir, sum húsast har, eru ovurfegnir um tey. Tað er bara ikki nokk, tí alt ov nógvir bólkar reika framvegis húsvillir runt og sleppa ikki at vísa, hvat teir duga.

Tað er okkurt øvut í, at føroyskir tónleikarar helst skulu hava eitt útlendskt blástempul, áðrenn politikarnir vilja lata dyrnar upp fyri teimum í Føroyum. Vit vilja lata dyrnar upp fyri øllum. Síðani kunnu føroyingar sjálvir sleppa at góðskumeta teir her í Føroyum - í einum rættiligum konserthúsi, sigur Rógvi á Rógvu.

